# Miðlamjarr

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein / Inna Törnroos



Elski at hata at vaska gólv!
***Kvinna, 38 ár***

Lurti meðan pápi tosar við ommu.
Pápi: Ja, tú fyllur 87 næsta ár.
Omma: Ha? Nei, nei eg fylli 86.
Pápi: Nei, tú verður faktiskt 87.
Omma: Tað var ikki eiti á.
***Kvinna, 40 ár***



*Eitt so stórt bragd forpliktar*

Heri Simonsen skrivar klummu um, at Torkil Nielsen, málskjúttin í Landskrona, noktar at tosa um avrikið.
(Sosialurin)



*Havnarmenn hava so ilt av klaksvíkingum, tí teir eru so framskygdir menn*

Jógvan Weihe tosar um klaksvíkingar, sum hann ætlar at keypa umstrídda húkin frá.
(Sosialurin)

*Eg spæli framvegis nakað av tennis og spæli nógvar uppvísningsdystir*

Spurningurin er, um russiska tennisstjørnan Anna Kournikova nakrantíð hevur gjørt nakað annað – hon var minst líka kend fyri at síggja gott út sum fyri at vinna tenniskappingar.
(Maxim)



*Um tú ert í einum umhvørvi, har fólk bara klappa hvørjum øðrum á ryggin, so eru eingir menningarmøguleikar*

Fyrrverandi danski hermaðurin BS Christiansen heldur, at tað er alneyðugt at siga, sum tað er.
(Sosialurin)



Eydnaðist at ganga allan vegin úr skiftirúminum út í svimjihylin og skimast eitt sindur rundan um meg, áðrenn eg updagaði, at eg hevði wc-pappír hangandi úr svimjibuksunum. Okkurt skal man gera fyri at fólk skulu flenna, ha?.
***Maður, 55 ár***

*Hetta hevur verið eitt av bestu árunum í mínum lívi*

Poppstjørnan Cheryl Cole tosar um farna árið, tá ið hon varð skild og fekk malaria – men eisini toppaði hitlistarnar
(The Sun)



*Tað er ikki lagt upp til nakrar broytingar, og eg fari ikki at leggja meg út í redaktionellu linjuna*

Nýggi eigarin av Dimmalætting, Eyðfinn Reyðberg, ætlar sær ikki at kollvelta blaðið.
(Dimma)



*Nýtt politiskt slogan uttan innihald, produserað til at burturforkláringar – at tøla við*

Løgtingsmaðurin Bjarni Djurholm tosar um hugtakið reformar.
(Sosialurin)

Ein WEIHE-maður í Havn ætlar at keypa tann stóra húkin fyri 50.000 kr.
***Maður, 45 ár***